# Magasin vorðið bretskt

Tað kenda handilshúsið Magasin í Keypmannahavn er nú farið á bretskar hendur. Tíðindastovan Bloomberg News visti í morgun at siga, at bretska handilsketan Debenhams hevur keypt Magasin, og at prísurin er 101 milliónir krónur. Stjórin í Magasin, Jón Bjørnsson, er fegin um søluna. Hann er serliga fegin um, at tað er ein handilsketa og ikki ein íleggjari, sum hevur keypt Magasin, tí tað merkir, at tann nýggi eigarin hevur skil fyri at reka handil, sigur hann. Sambært stjóranum fær eigaraskiftið onga ávirkan á virksemið í Magasin, og øll starvsfólkini verða verandi í starvi.




# Lótu prest leysan

Tann 79 ára gamli írski presturin Michael Simott, sum varð burturfluttur í Filipsoyggjunum fyri einum mánaði síðani, er nú latin leysur. Katólski presturin sat á skrivstovu síni, tá vápnaðir úppreistrarmenn burturfluttu hann tann 11. oktober. Myndugleikarnir í Filipsoyggjunum halda, at tað var ein islamskur uppreistrarfelagsskapur, sum burturflutti prestin. Írski forsætisráðharrin, Brian Cowen, er fegin um, at landsmaður hansara er latin leysur. Hann avsannar gitingar um, at Írland hevur goldið burturflytarunum loysigjald fyri at fáa Michael Simott leysan, skrivar Reuters.

## Arbeiðsfundur um nýggju gymnasialu skipanina

TÍÐINDASKRIV

Mentamálaráðið hevur á fundi í vikuni við allar skúlaleiðarar á miðnámsskúlunum viðgjørt endurskoðanina av gymnasialu miðnámsútbúgvingunum. Arbeitt verður við at gera eina nýggja løgtingslóg um gymnasialar miðnámsútbúgvingar, sum ásetir karmarnar um nýggju gymnasialu útbúgvingarnar.

Ein partur av arbeiðinum við nýggjari gymnasialari skipan er at gera nýggjar námsætlanir til allar lærugreinir bæði í fólkaskúlanum og á miðnámsskúlunum. Saman við nýggjum próvtalsstiga skulu hesar setast í verk komandi skúlaár.

Aðrir spurningar vórðu eisini umrøddir, nýggja breytaskipanin, komandi bygnaðurin, skipan av skúladeplum og arbeiðið við at endurskoða yrkisútbúgvingarnar.

- Nýggja gymnasiala skipanin og endurskoðanin av yrkisútbúgvingunum eru neyðug fyri at vit kunnu fylgja við menningini á útbúgvingarøkinum og eisini tryggja okkara ungdómi atgongd til hægri lærustovnar, bæði her heima og uttanlands. Tað er alneyðugt, at arbeiðið verður gjørt til lítar, og kunning og samskifti millum partarnar er av alstórum týdningi, segði landsstýriskvinnan á fundinum, og fegnaðist um góða samstarvið við skúlarnar, og takkaði skúlunum fyri ta stóru orku, teir leggja í arbeiðið.

# Svenska bjargingartænastan á vitjan

**Hesa vikuna hava átta mans frá svensku bjargingartænastuni verið á vitjan**

BJARGING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Bjargingarbáturin LÍV er ein av 27 líknandi svenskum bjargingarbátum. Hinir 26 hava støð kring við strendurnar í Svøríki.

Og svenska bjargingarfelagið er stórt og umfatandi. Heilar 66 bjargingarstøðir eru fram við strondini og felagið telur fleiri enn 2000 sjálvbodnar bjargingarmenn.

Teir átta siga, at ein av orsøkunum at koma til Føroya at halda skeið var eisini, at kunna seg um viðurskiftini í Føroyum, sum á nógvar mátar eru ólík teimum í Svøríki.

Við sær hava teir eisini tveir vatnskootarar, sum innganga í skeiðini. Spurdir um, hvat hesir skootarar verða nýggir til siga svensku bjargingarmenninir, at teir fyrst og fremst verða nýttir á grunnum vatni, har størru bátarnir eru í vanda fyri at taka botn.



*Svensku bjargingarmenninir saman við føroysku umboðunum, Edvard Kjeld og Jan á Argjum (í orangelitum draktum)*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Hesir skootararnir eru heilar 1000 hestakreftir og ógvuliga manøvreriligir.

Svensku bjargingarmenninir komu til Føroya mánadagin, summir við Norrönu, aðrir við flogfari, og teir fara avstað aftur á sama hátt, summir við Norrönu í kvøld saman við skootarunum, og restin við flogfari í morginárini.

# Føroyingar í Suðurjútlandi

*Poul Jóhan Djurhuus*
*gjaranes@olivant.fo*

Á teimum føroysku møtunum í Suðurjútlandi hetta vikuskifti vitja Svenning av Lofti og Poul Færø úr Føroyum, sum koma at tala á øllum møtunum. Hans Jákup á Lava kemur at syngja og spæla.

Svenning og Poul koma at ferðast í Danmark teir næstu dagarnar, og koma eisini at luttaka á møtunum á Malta. Teir ynskja at vitja føroyingar í Danmark, og er tað onkur, sum ynskir eina vitjan av teimum, er ein vælkomin at




*Svenning av Lofti og Poul Færø*

seta seg í samband við Poul Jóhan Djurhuus tlf. +298 22 83 14

Elsa og Poul Jóhan Djurhuus koma aftur at avloysa á Malta í Hirtshals. Tey fara við Norrønu hóskvøldið 11. november og fara beinleiðis til Sønderborg, har regluliga føroyska møti verður leygarkvøldið. Tey vera á Malta til mars/apríl 2010. Levi og Greta Joensen, sum virka fast á Malta, eru komin til Føroyar og verða heima til í vár. Skráin fyri møtini: Í Esbjerg - Spangsbjerg Møllevej 16c Mølleparken fríggjakvøldið 13.nov. kl.19.30. Kontaktpersónar: Guðri og John Zachariassen, Esbjerg tlf: +45 20 66 89 31. Í Sønderborg - Skolehjemmet, Sdr. Landevej 28 leygarkvøldið 14.nov. kl.19.00 (breyðbróting í somu hølum sunnumorgunin 15. nov. kl.10.00). Kontaktpersónur: Germ Hansen, Sønderborg tlf: 74 43 61 08 T-postur: g-b@stofanet.dk. Í Vejle - Staldgaardsgade 4. (í hølunum hjá Frelsunarherinum)sunnudagin 15.nov. kl.17.00 (breyðbróting kl.16.00 í somu hølum). Kontaktpersónur: Svend Jensen, Vejle tlf: +45 30 27 14 95.